Skála-ÍF 2-1 (1-1):

# ÍF misti á stokkinum

**Skála megnaði ikki at varðveita góða bóltspælið, sum er vorðið teirra aðalsmerki, og sum teir vístu fyrstu løtuna móti ÍF, men teir vóru hepnir og fingu øll stigini, tá ið teir í síðstu løtu fingu brotsspark, sum fuglfirðingar ikki sóu, og sum skálamenn sjálvir siga seg ivast í, at teir áttu**



*Fyri tað nógva var tað Skála, sum trýsti fyri at fáa stigini, men fram til tað allar seinasta hildu fuglfirðingar fast í vónini um, at okkurt skuldi spyrjast burtur úr dystinum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

SKÁLA-ÍF

*Jóannes Hansen*

Tað var ein øgiligur lætti hjá oddaliðnum, og tað var eitt óvanliga stórt vónbrot hjá gestunum úr Fuglafirði, sum stríðast fyri at sleppa undan niðurflytingar vandanum, og sum veruliga vístu hugburðin, sum skal til.

Tá ið tað restaði ein minuttir bendi alt á, at tað fyri triðju ferð í ár skuldi eydnast fuglfirðingum at megna javnleik móti Skála, og harvið bendi alt eisini á, at tað skuldi verða enn ein lokaluppgerð, sum skuldi vera orsøkin til, at Skála misti tvey týdningarmikil stig í strembanini at vinna meistaraskapin fyri fyrstu ferð.

Men so brikslaði Lassin Isaksen fyri brotssparki. Fuglfirðingar vóru rættuliga misnøgdir, og eftir dystarlok skiltist á heimamonnunum, at teir ikki høvdu knarrað, um dómarin í staðin fyri brotssparki til Skála hevði dømt fyri frísparki til ÍF. Felags fatinin tykist vera, at bæði Pætur Dam Jacobsen, sum royndi at fáa fatur á innlegginum úr høgru, sum hann ongan møguleika hevði at røkka, tí sendingin lá ov høgt, og Áki Petersen, sum brotssparkið varð dømt ímóti, togaðu í troyggjuna hjá hinum. Fyri ÍF var tað harmuligt og lítið rutinerað av verjuspælaranum, at hann var í so harðligur, tá ið hann royndi at slíta seg leysan av mótstøðumanninum.

Tað var hetta síðsta, sum dómarin tóktist at bríksla fyri, og Iulian Florescu var púra ivaleysur, tá ið hann smekkaði bóltin í málið, og harvið vóru øll stigini eftir á Skála, og fuglfirðingarnir fóru nakkalangir og vónbrotnir um aftur Gøtueið og Varmakeldueið.

Í løtuni eftir dystarenda kendist lítil troyst í tí, men í vikunum báðum, sum standa fyri framman undan VB vitjanini kann góði hugburðurin hjá ÍF á Skála ivaleyst nýtast.

ÍF var ikki komið út á Skála fyri at undirhalda. Petur Simonsen og hansara menn kendu sín leiklut. Hann var at liggja aftarlaga á vøllinum. Eyðun Ryggshamar var eyka verjukendur miðvallari, og Sylla var einsamallur á toppinum. Stórur dentur varð lagdur á deyðbóltsstøðurnar, sum ÍF fleiri ferðir fyrr í ár hevur fingið nógv burturúr, og so leingi, sum munurin bara var eitt mál og serliga, tá ið tað stóð á jøvnum, var eingin sum helst orsøk at fara ov nógv fram.

### Gekk striltið

Skála legði fyri í eyðkenda stílinum. Hesa ferð var Pætur Dam Jacobsen á vongverjanum í høgru, miðvøllurin var í kendu uppstillingini, Bogi Gregersen og Jónhard Frederiksberg vóru í álopinum, og fyrra partin av fyrra umfarinum bendi alt á, at tað skuldi ganga, sum tað so ofta fyrr í ár hevur gjørt, tá ið Skála hevur verið á heimavølli.

Leiðslumálið hjá Skála minti um so nógv onnur mál, sum teir í ár hava fingið í sambandi við deyðbóltsstøður, og tað var harvið staðfesting, at tað loysir seg at brúka tíð og orku gerandiskvøldini at venja sovornar støður. Hagtalsliga verður alt størri partur av málunum í fótbólti skorað í sambandi við fríspørk, hornaspørk og innkast og sjálvandi eisini brotsspørk, og ivaleyst er talið hjá Skála í ár omanfyri miðaltalið yvirhøvur.

Bjarni Jørgensen sendi horna innfyri úr vinstru. Eftir tvær ferðir aftur og fram endaði bólturin hjá miðverjanum Rúna Rasmussen, sum setti krúllin undir bóltin, ið umvegis tvørtræið endaði í ÍF málinum.

Fagnaðurin var stórur millum viðhaldsfólkini hjá heimaliðnum, og hetta kundi bent á, at málini fóru at skola ígjøgnum hjá illa sperdu fuglfirðingunum. Men soleiðis gekk tað ikki - als ikki.

ÍF varðveitti spælskipanina og ikki minst tolið. Teir lupu ikki framav. Teir vóru tættir á miðvøllinum, og verjan við veteranunum Bartali Eliasen og Símuni Eliasen á odda stríddist sum fyri lívinum. Eftir fyrstu tjúgu minuttirnar gjørdist tað alt tyngri hjá Paula G. Hansen og Nenad Stankovic at fáa glið, breidd og dýpd í samanspælið. Ferðin fór eitt sindur niður, og fuglfirðingar vóru ikki serliga hóttir.

Fyritreytirnar hjá ÍF batnaðu, tá ið seytjan minuttir vóru farnir. Hanus Eliasen, sum hevur verið eitt sindur inn og út av liðnum, men sum hesa ferð var ytstur á miðvøllinum í høgru, vann bóltin á Skála miðvøllinum. Hann sneiddi seg framvið tveimum, áðrenn bólturin í takling við mótstøðumann støkk til Sylla. Møguleikin tóktist vera burtur, men Sylla stríddist fyri søkini næstan á baklinjuni, og hann smekkaði bóltin í málið aftanfyri Vlad Filopivic, sum neyvan hevði roknað við so vandamiklari skotroynd úr so næstan vónleysari støðu.

Fótbóltsspælið hevur fleiri ferðir fyrr í ár verið betri á Skála, enn tað var sunnudagin. Men undirhaldsvirðið var høgt, tí talan var um sera spennandi og tætta uppgerð. Skálamenn royndu og royndu, og onkra ferðina í 2. hálvleiki fingu teir hornaspørk, men teir fingu einki burturúr teimum, og tað kendist sum um, at ávíst mótloysi hevði hug at taka seg upp.

Í staðfestingini av at tað ikki lá fyri at spæla Jónhard Frederiksberg og Boga Gregersen leysar, skifti Johan Nielsen teir báðar út. Í staðin komu stóru menninir Arnhold Berg og Sveinur Justinussen inn í álopið. Vónin tóktist vera, at teir skuldu vinna luftdystir, og at tað kanska fór at bera til at fáa returbólt í ÍF málið.

Tað eydnaðist ongantíð, og fuglfirðingar hildu høvdið kalt. Inntil næstsíðsta minuttin. Tá metti dómarin, at Áki Petersen hevði gjørt brotsspark móti Pæturi Dam Jacobsen, og tað var avgerandi fyri, at stigini vóru eftir á Skála.

## FAKTA UM DYSTIN

**Skála-ÍF 2-1 (1-1)**
1-0: Rúni Rasmussen 9.
1-1: Sylla D. Ahmed 18.
2.1: Iulian Florescu br 90.
**Dómari:** Lassin Isaksen
**SKÁLA:** Vlad Filipovic - Pætur Dam Jacobsen, Rúni Rasmussen, Milic Curcic, Iulian Florescu - Bjarni Jørgensen, Nenad Stankovic, Pauli G. Hansen, Hanus Thorleifsson (Bárður Danielsen, 71.) - Jónhard Frederiksberg (Arnhold Berg, 68.), Bogi Gregersen (Sveinur Justinussen, 79.)
**Gult kort:** Pauli G. Hansen
**ÍF:** Jacob Kaas - Áki Petersen, Bartal Eliasen, Símun Eliasen, Fritleif í Lambanum - Hanus Eliasen, Emil N. Leifsson, Eyðun Ryggshamar (Frank Poulsen, 82.) Høgni Zachariassen, Atli Petersen (Gunnar Nielsen, 88.) - Sylla D. Amed
**Gult kort:** Áki Petersen, Atli Petersen, Hanus Eliasen

# 12 bólkamet í Klaksvík

Metkappingin livdi upp til heitið, tá nýggja svimjiárið fór av bakkastokki um vikuskiftið.

Sonevndu met-kappingarnar eru seinasta høvið hjá svimjarum at seta met í sínum bólki, áðrenn tey verða flutt ein bólk upp. Tað var væn tandi, at onkrir svimjarar tí fóru at seta nýggj bólkamet, og serliga ein teirra, Turið Christiansen, tók eisini av hesum møguleikanum. Hon setti ikki færri enn sjey met í bólki 1.

Í bólki 3 hjá dreingjum setti Høgni M. Rasmussen nýtt met í 200 metra blandaðari svimjing, og í bólki 3 hjá gentum eydnaðist eisini stafettini hjá Havnar Svimjifelag at skera burtur av trimum bólkametum.

-jm

## Metini

**Bólkur 1**
**Turið Christiansen, Reki, Leirvík**
100 metrar frí 1:18.16
50 metrar frí 0:36.07
100 metrar rygg 1:30.98
50 metrar rygg 0:42.29
100 metrar bringa 1:45.63
50 metrar bringa 0:49.00
50 metrar firvald 0:40.90

**Bólkur 3**
Havnar Svimjifelag (Guðrun H. Jacobsen, Katarina Lamhauge, Bjørg Seloy og Helena G. Jacobsen)
4x200 metrar frí 10:47.98
4x100 metrar frí 4:46.63
4x50 metrar frí 2:06.64
4x50 metrar blandað 2:24.72

**Bólkur 3**
Høgni Miné Rasmussen, Havnar Svimjifelag
200 metrar blandað 2:37.69